FISKIMÁLARÁÐIÐ

**Lønjavningarstovan søkir 2 skrivstovufólk**

Størv sum skrivstovufólk á Lønjavningarstovuni verða hervið lýst leyst at søkja til setan frá 1. desembur 2006 ella eftir avtalu.
Talan er um eitt starv fulla tíð og eitt starv hálva tíð.

Lønjavningarstovan er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.

*Starvið fevnir m.a. hesar uppgávur:*
· skráseting av avreiðingum og mynstringum
· viðgerð og avgreiðslu av fiskivinnustudningum
· telefonavgreiðslu
· aðrar fyrifallandi uppgávur

*Førleikakrøv:*
· HH, skrivstovuútbúgving ella onnur viðkomandi útbúgving
· góð evni at samskifta við fólk
· hollan telduførleika á brúkarastøði
· góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
· góð samstarvsevni
· starvsroyndir innan líknandi starvsøki er ein fyrimunur

*Setanartreytir:*
Løn- og setanartreytir eru sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar tess, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Lønjavningarstovan.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

Til ber at ringja til Fiskimálaráðið tel 353030 og Hanni Thomsen deildarstjóri kann geva neyvari upplýslingar um størvini.

*Umsóknir:*
Umsóknir saman við avriti av prógvum, lívrensli og møguligum viðmælum, skulu vera Lønjavningarstovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin 24. oktobur 2006 kl. 12:00.

Umsóknir skulu sendast til:

**Lønjavningarstovan**
Postsmoga 347, 110 Tórshavn

---

SUNDA KOMMUNA

**Frá Sunda kommunu**

**Til 4 ára gamalt barn við serligum tørvi, ið gongur á dagstovni, verður søkt verður eftir**

# stuðulsfólki

Uppgávan hjá stuðulsfólkinum er í samstarvi við dagstovnin at stimbra barnið málsliga, grov- og fínmotoriskt og sosialt.

Stuðulsfólkið skal eisini kunna fara til ymiskar venjingar við barninum, so sum fysio- og ergoterapi og svimjing. Tað er tí neyðugt, at viðkomandi hevur koyrikort og bil.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava námsfrøðiliga útbúgving, men onnur eru tó eisini vælkomin at søkja.

Stuðulsfólkið verður knýtt at dagstovninum og skal tí kunna arbeiða á jøvnum føti við hini starvsfólkini.

**Vit ynskja, at tú hevur**
- hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum
- virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teimum vaksnu
- hug til at skapa og seta dám á gerandisdagin á dagstovninum
- góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálv-støðugt.

**Setunarviðurskifti**
Starvið, sum fevnir um 25 tímar um vikuna, verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita við at venda sær til sosialu deild á tlf. nr. 471022 ella 771023.

Umsóknir við avritum av prógvi, starvsroyndum, møguligum viðmælum v.m. mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi 31. oktobur 2006, og skulu sendast til:

**Sunda kommunu**
Sosiala deild
Oyrarbakkavegur 3
400 Oyrarbakki

---

FAROE
LAW

Faroe Law bjóðar heimligar og altjóða loysnir

*Tosi vi :*

**Eyðfinn Jacobsen**
**advokat**

**Jens Wang**
**advokatfulltrúa**

Sosialurin

Tróndargøta 19
P.O.Box 158
FI-110 Tórshavn
tel 359 900 - fax 359 901
mobil 219 902 - 219 903
faroe-law@faroe-law.fo

www.faroe-law.fo

---

FAROE DIVE.fo

**Grundskeið í fyrstuhjálp**
**19. Oktober**
**Tilmelding á 218929**

EMERGENCY® first response

---

Lesið
Sosialin
-tað loysir seg

---

**Skoda Octavia Combi TDI SLX**



Sept. 2000
Km 99.000
Nýsýnaður
*Til sølu vegna flyting*

Silvurmetall, 15" alu felgur, sentrallás, startsperru, hita í setrunum, el-rútar, el-spegl v/ hita, armlen, bagagurúms dekkari, split baksetur, abs, esp, innlittir kúgfangarir, hekkuspoilari, tónaðir rútar, 1 eigari, ikki roykjari, servisa og tannreim ok.

***tlf. 254199 ella***
***tlf. +45 96834080***

---

# Aðalfundur

Aðalfundur hjá ferðavinnuni í Norðoyggjum verður mánadagin 31. oktober kl. 19.00 á Norðoya Kunningarstovu.

**Ferðavinnan í Norðoyggjum**

---

*Gravarhjálp*

*Marknagilsvegur 86 · 100 Tórshavn*
*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*herman@post.olivant.fo*

**Vit útinna allar uppgávur í sambandi við eina jarðarferð frá byrjan til enda**

• Eisini sangir, blómur og kransar
• Vit syrgja fyri sangarum *(í Tórshavn)*
• Vit framleiða okkara egnu kistur *(veita um alt landið)*
• Skipa fyri líkflutningi til og úr Føroyum
• Skipa fyri líkbrenning
• Hjá okkum kanst tú bestemma **tín síðsta vilja**

Sosialurin 341800

---

**Suðuroyar Syðra**
**Javnaðarfelag**

Fundur verður í hølum Vágs Matmøðrafelags onskvøldið 18.10. kl. 20.

Við á fundinum verða Henrik Old løgtingsmaður og Kirstin Strøm Bech býráðsformaður.

---

**Norðoya**
**Javnaðarfelag**

Útsetti aðalfundurin verður í Skálanum í Klaksvík mikukvøldið 18. oktober kl. 19.30.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**